## Barcelona vil hava Villa

Barcelona ætlar sær eftir øllum at døma David Villa. Forsetin í spanska felagnum, Joan Laporta, staðfestir í spanska blaðnum Marca, at teir ætla undir samráðingar. – Villa veit, at vit fegin vilja hava hann í hópin. Vit ætla okkum undir samráðingar, og síðan fáa vit at síggja, sigur Laporta. Viðmerkingin hevur verið til stórt vónbrot hjá Samuel Eto'o, sum ætlar sær aðrar vegir.




## ÍF Føroyar er í trupulleikum

Lutakastið til fyrsta umfar av donsku steypakappingini sær sera áhugavert út fyri ÍF Føroyar. Men tað er ikki vist, at føroyingarnir fara at royna seg móti AB í næstbestu donsku deildini. – Flestu av okkara leikarum er í Føroyum til í september. Vit mangla eina rúgvu av spælarum í august, og tað er altíð ein trupulleiki, tá kappingin byrjar. Hetta er tann størsti dysturin fyri felagið nakrantíð, men júst nú verður tað sera trupult. Vit stríðast fyri at fáa fólk til dystin, sigur Uni Leitisstein Hansen, venjari, við bold.dk




**Absalon Hansen, Annika Vang og Hans Petur Højgaard lótu ongan iva vera um, at tey vóru so nógv tað besta liðið, tá finalan varð skotin móti annars sterka liðnum hjá Rhodos**

Mynd: Eirikur í Jákupsstovu

# Recurve-liðið vardi borg

**Føroysku recurve-skjúttarnir skutu seg til gull og nýtt oyggjaleikamet í face-to-face skjótingini, og vardu harvið borg, tá compound-skjúttarnir ikki megnaðu at endurvinna sítt gullmerki**




Jákup Mørk

Føroysku bogaskjúttarnir endaðu sínar oyggjaleikir fyrrapartin í dag, tá teir skutu liðkappingina í face-to-face.

Stóra føroyska hetjan á bogaskjótibreytini hevur verið Annika Vang, sum undan hesum hevði vunnið trý av trimum møguligum gullmerkjum, og tað var við stíli, at hon og teir báðir menninir á liðnum skutu seg til gullið í dag.

### Byrjanin alt at siga

Nervarnir hava um ikki alt, so í øllum førum øgiliga nógv at siga, tá skotið verður face-to-face, og tað var sjónligt, at føroyska sjálvsálitið var í toppi eftir fyrsta umfarið, har okkara løgdu seg átta stig fram um Rhodos.

Og so gekk tað bara ein veg. Samlaða stigatalið hjá føroyska liðnum gjørdist 192, sum er heili 10 stig meira enn gamla metið. Rhodos fekk tilsamans 169 stig, so tað ber illa til at siga annað, enn at føroysku skjúttarnir bukaðu mótstøðuna. Og tað var Hans Petur Højgaard als ikki ósamdur í, tá vit prátaðu við hann eftir sigurin.

- Her var eingin ivi um úrslitið. Vit byrjaðu væl, og so koyrdi tað bara. Tú ert púrasta róligur, tá tú veitst, at tað gongur liðnum væl, so nervarnir sluppu als ikki at spilla spælið hjá okkum, segði Hans Petur Højgaard.

### Orkney var yvirvaldið

Í Compound hava føroyingar vanliga staðið seg sera væl – eisini í hesi kappingini, men tað gekk akkurát ikki føroyska liðnum hesaferð.

Føroyska úrtøkan í finaluni móti Orkney var 209 stig, sum absolutt kann góðtakast. Men tað hjálpti ikki tað heilt stóra, tá Orkney, sum fyri fyrstu ferð hevði heilt compound-lið við á leikunum, skeyt seg upp á 214, ið er tað sama, sum oyggjaleikametið. Eitt met, sum tað nú eru fýra lond, sum eiga sín part í. Jersey í 2003, Hetland í 2005 og Føroyar í 2007 skutu nevnliga øll 214 stig í finaluskjótingini.

## Bronsa til judo

**Tað vísti seg at vera svart óhapp hjá føroyska judolandsliðnum, at teir longu í fyrsta umfarinum rendu seg í álendska liðið.**

**Áland vísti seg nevnliga sum sterkasta liðið í kappingini, og tað var í fyrsta dystinum, at teir fingu størstu mótstøðuna.**

**Ístaðin máttu føroyingarnir so taka til takkar við at berjast um bronsuna, og hetta gekk upp á stás.**

**Bæði móti Gibraltar og Guernsey vunnu Føroyar við fullum stigatali, altso 7-0, og tað var ein tjúkk strika undir veruleikan, at Føroyar altso áttu næst sterkasta liðið á leikunum. Men í úrslitalistanum, sum jú verður standandi sum sannleikin, vóru okkara triðbestir.**

**-mørk**